Fylgiskjal 16

Til Umhvørvismálaráðið
Landsstýriskvinna Ingilín Didriksen Strøm

Tórshavn 26. februar 2024

Hoyringarsvar til lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan

Viðv. §3: hækkingin er lítil, kr. 5.000,-, og tekur ikki atlit til bæði øktar fíggjarligar útreiðslur í gerandisdegnum og tí, at hægstaútgjaldið frammanundan er lágt.
Limir okkara mugu í niður í løn, um teir skulu í barsil, og hetta streingir familjur óneyðugt. Hóast hægsta útgjald fer upp, so fer tað ikki so langt upp, at tað broytir reellu støðuna hjá barnafamiljum.

Viðv §10: Tað er gleðiligt, at atlit nú verður tikið til teirra, ið eru nýútbúgvin og ikki longur hava rætt til stuðul frá Studna. Størri fleksibilitetur fyri broyttar inntøkur í farnu 12 mánaðunum eigur at vera fyri øll. Lógaruppskotið átti eisini at havt ásetingar um minsta-útgjald til teirra, ið gerast við barn í serliga ungum aldri.

Viðv §11: Er hugsað um GDPR í sambandi við at landsstýrisfólkið kann fáa váttan um mettan føðidag og fráboðan um barnsburð? Hví fer henda kunning ikki beinleiðis til Barsilsskipanina?

Viðv §12: Er hugsað um GDPR í sambandi við hesar automatisku flytingar av kunning um borgarar? Er tað tryggjað, at borgarin altíð veit av frammanundan, at upplýsingar kunnu finnast fram við beinleiðis atgongd? Kann borgarin nokta hesum? Hvørja trygd hevur borgarin fyri, at upplýsingarnar bert fara í tær hendur, har tær eru neyðugar?

Vinarliga

Tina K. Jakobsen, forkvinna
Yrkisfelagið Miðnám
Varðagøta 8
100 Tórshavn